

Polar Empress er farið í Miðjarðarhavið at arbeiða. Mynd Jan Müller

# Úr Vági í Miðjarðarhavið at skjóta seismikk

**Jan Müller**

28.11.2015 - 19:38

Oljan.fo

Tey bæði frálandsskipini, sum hava ligið fyri teym í Vági í nakrar vikur, eru farin aftur til arbeiðis. Seismikkskipið Polar Empress er farið í Miðjarðarhavið at skjóta seismikk.

Hjálparskipið Sanco Sky fór til Norra. Helst tekur okkurt annað veitingarskip við arbeiðinum hjá Polar Empress á leiðunum út fyri Malta.

Hóast steðgurin var stuttur, so kom tað kortini væl við hjá Vágs havn at hava eitt av heimsins størstu seismikkskipum liggjandi við bryggju í nakrar vikur. Hetta er so fyrstu ferð, at útlendsk frálandsskip hava valt havnina í Vági og Vágs fjørð sum liggipláss, meðan bíðað varð eftir nýggjum arbeiðsuppgávum.

Borgarstjórin Dennis Holm heldur hetta er ein góð byrjan og sigur, at tey fara at halda fram við at marknaðarføra Vágs havn sum atløguhavn fyri útlendsk frálandsskip.